Altjóða kvinnudagur í Miðvági

Altjóða kvinnudagurin, sum er tann 8. mars, verður hildin við kvøldsetu í bygdarskúlanum í Miðvági

KVINNUDAGUR
Edvard Joensen

Altjóða kvinnudaurin, sum er tann 8. mars., verður hildin um allan heim. Eisini í Miðvági. Tað verður við kvøldsetu í bygdarskúlanum.

Marjun í Kálvalíð er ein teirra, sum skipar fyri kvøldsetuni í Miðvági. Hon sigur, at ætlanin er at hava eitt mentanartiltak klokkan 20 um kvøldið. Tað verður ókeypis atgongd, og saktans sleppa menn eisini inn. Men tað verða bara kvinnur, sum fara at føra fram tað, sum verður at siggja og hoyra á kvøldsetuni.

Á skránni verður alt frá skemtileikum til fyrilestur. Á vegnum verður eisini tónleikur, sangur og upplestur.

Marjuní Kálvalið fer saman við øðrum at standa fyri tí skemtiliga. Nakrar ungar gentur úr Miðvági hava ein tónleikabólk, sum fer at framføra ymisk løg. Serliga donsk frá kvinnubólkinum Venter på far, greiðir Marjun í Kálvalíð frá.

Jónleyg á Løgmansbø, sum er ættað úr Miðvági, fer at lesa upp og syngja úr yrkingasøvnum, hon hevur givið út. Undirsþæli fara fastrar hennara av Løgmansbø at standa fyri.

Kvinnur úr Vágum fara eisini at sýna fram ymisk listaverk, tær hava gjørt.

Marjun í Kálvalíð sigur, at ætlan teirra, sum skipa fyri, er at fáa eina kvinnu, sum annaðhvørt er politikari ella frammarlaga í vinnulívinum, at halda ein stuttan fyrilestur. Enn er tó ikki avgjørt, hvør tað verður, sigur hon

Sum vera man verður felagssangur á eini slíkari kvøldsetu, eins og kaffi og køkur eisini eru at fáa eitt slíkt kvøld. Og tað er alt samalt ókeypis, minnir Marjun í Kálvalíð á.

Hugnakvøld í Sandavági

Sandavágs Ítróttarfelag skipar í kvøld fyri hugnaløtu í SÍF húsinum. Ymiskt bæði til gaman og álvara verður á skránni, sigur felagið



HUGNAKVØLD
Sandavági

Í kvøld klokkan 19.00 skipar Sandavágs Ítróttarfelag fyri hugnaløtu í SÍF húsinum. Fólk, bæði úr Sandavági og uttan eftir, fara at luttaka.

Høvuðsnavnið á kvøldsetuni verður Heri Joensen, prestur í Havn, sum er at hugleiða um lívið á bygd, sum sagt verður.

Men eisini sandavágsfólk, bæði burturflutt og tey, sum búgva í bygdini, fara at hava ymsikt til kemtanar og álvara.

Knút Olsen, sandavágsmaður í Havn, og Marius Joensen, sandavágsmaður í Miðvági, fara at syngja. Saktans sangir, sum á einhvønn hátt hava tilknýti til Sandavágs.

Av tí meira skemtiliga undirhaldinum verður »Mótashow«, sum Jonna og Heinabandin, sum tey siga lokalt, fara at standa fyri. Tey hava roynt seg fyrr, og tað tykist ikki vera mark fyri, hvat tann bandin kann finna uppá.

Sandavágskøkurnar eru tiltiknar,og onkrar teirra verða eisini at fáa saman við kaffi í SÍF húsinum í kvøld.

Kostnaðurin fyri tiltakið er kr. 60,-

ej

Betri telefonviðurskifti í Bø

Bíggjarfólk hava verið illa fyri við telefon í longri tíð. Men nú kemur vend í, sigur borgarstjórin

TELEFONSAMBAND
Edvard Joensen

Bø: Telefonviðurskiftini í Bø fara at batna munandi heilt skjótt, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Kommunu.

Telefonsambandið hevur verið vánaligt í Bø í longri tíð, siga bíggjarfólk. Linjurnar hava verið ringar, og hoyrilíkindini hareftir. Og hjá onkurum hevur als eingin linja verið, so tey máttu klára seg við fartelefon.

– Men hetta verður nú broytt, tí nú er avtalað gjørd við Føroya Tele um, hvussu hetta skal loysast, sigur Jógvan Páll Joensen.

Einki veruligt kaðalhús hevur verið í Bø, sigur hann. Ælanin hevur so verið at bygt eitt nýtt hús til at savna kaðalar í, men tað hevur drigið út orsakað av útskiftingina, sum verið hevur í bygdini. Tað munnu vera eini tvey- trý ár, síðan nýggjur kaðal varð lagdur um alla bygdina, og Føroya Tele søkti um at sleppa at byggja eitt nýtt kaðalhús.

Men tað hevur ikki borið til at fingið ávíst nakað pláss at seta hetta nýggja húsið á, sigur borgarstjórin, tí eingin hevur rættiliga vitað, hvør eigur havt, fyrr enn útskiftingin er liðug.

– Nú er tað ofta so við slíkari útskifting, at kærur koma um avgerðir, tíknar eru, og so enda tær hjá ymsum kærustovnum, og tað tekur ofta tíð. Tá so ein avgerð er tikin, verður kært umaftur, og meira tíð gongur. Man ikki okkurt sovorðið eisini hava verið uppi í, nú útskift er í Bø? spyr borgarstjórin.

Hann sigur, at okkurt hús hevur ligið heilt uttan telefonlinjuni eitt ár, og tey hava so verið noydd at brúkt fartelefon. Og internet er ikki hugsingur um, sum er.

Men nú er semja gjørd í seinastu viku um, hvar hetta nýggja kaðalhúsið skal standa, so nú verður heilt skjótt, til telefonviðurskiftini í Bø verða í lagi, sigur Jógvan Páll Joensen, borgarstjóri í Bíggjar Kommunu.

Fyri einum tveimum, trimum áru síðan varð nýggjur kaðal lagdur til alla Bíggjar bygd, men ikki fyrr enn nú er klárt at fara undir at byggja kaðalhúsið, so telefonviðurskiftini verða brúkilig í bygdini

Mynd: Edvard Joensen

Fótbóltsstuðul í Vágum

Vágafólk royna at fáa eitt stuðulsfelag til fótbóltssamtakið FS Vágar upp at standa. Fyribilsnevnd varð vald á stovnandi aðalfundi herfyri

ÁHUGAFELAG
Edvard Joensen

Vágar: Nevndin fyri stuðulsfelgnum hjá FS Vágum er farin undir átak at fáa nýggjar limir í felagið. Ymiskir ágóðar verða bodnir teimum, sum gerast limir í stuðulsfelagnum.

Í tíðindaskrivi, sum sent er runt í Vágum, verður sagt, at ein tann størsti trupulleikin hjá felagnum er, at ov lítið bakland er til, at felagið kann muna nakað fíggjarliga hjá FS Vágum. Tí verður nú roynt at fáa fólk, eisini vágafólk, sum búgva aðrastaðni enn í Vágum, at stuðla felagnum.

Roynt verður at fáa nýggjar limir at tekna seg. Tað kann gerast á ymsan hátt. Fólk fáa møguleika at velja millum fýra ymiskar limaskapir, um tað kann nevnast so.

Talan er - næstan sum í Gekkinum - um val millum ymiskar litir. Grønt, gult, blátt og reytt limakort.

Grøna limakortið fæst fyri eina flyting á kr. 100,-, sum so er limagjald fyri árið.

Gula limakortið fæst við at tekna seg fyri einum gjaldi á kr. 50, - um mánaðan. Tá fæst afturfyri eitt fríkort til alalr heimadystirnar hjá FS Vágum.

Bláa limakortið, sum kostar 100,- krónur um mánaðan, gevur nakrar fyrimunir afturat. Tann sum teknar blátt hald, fær umframt fríkort til dystirnar, eisini fríkort til onnur tiltøk hjá FS Vágum. Eitt nú dans, konsertir, framsýningar og veitslur.

At enda er tað reyða limakortið, sum serliga ætlað er fyritøkum og stovnum, og er fyri øll gjøld, sum eru hægri enn 100,- krónur um mánaðan. Tað kortið gevur somu fyrimunir sum tað bláa kortið.

Tann, sum ynskir tað, kann gerast limur í FS Vágum við at flyta limagjaldið á konto í Føroya Banka ella Føroya Sparikassa.

Limirnir í stuðulsfelagnum fáa regluliga sendandi kunningarskriv frá felagnum, sigur nevndin í tíðindaskrivinum.

Nevndin er skipað soleiðis, at Sigfríður Olsen í Sandavági er formaður. Sjúrður Poulsen í Miðvági er skrivari, og Jonhard Magnussen í Miðvági er samskipari.

Í so bíligur skúli

Í samrøðuni í fríggjadagsblaðnum við Heina Holm, borgarstjóra í Kvívík er komið at standa, at Kvívíkar Kommuna hevur hækkað skattaprosentið fyri at fáa triggjar milliónir til at fíggja skúlaútbygging fyri.

Tað er eisini rætt, men sjálvandi bara partvís. Tí tær triggjar milliónirnar eru tað, sum manglar í til útbyggingina, sum samlað fer at kosta einar níggju-tíggju milliónir, sigur borgarstjórin.

Eiðis Bóltfelag fyllir runt

Mánadagin fyllir Eiðis Bóltfelag, EB, 90 ár. Í hesum árinum verður aftur farið undir at spæla hondbólt á Eiði

Føðingardagur
Edvard Joensen

Eiði:
Ejde Boldklub sá dagsins ljós 24. februar 1913. Felagið fekk navnið EB og hevur tað enn, hóast navnið nú er Eiðis Bóltfelag.

Mánadagin eru sostatt liðin 90 ár, síðan felagið varð stovnað. Og tað verður hátíðarhildið við eini stovningarveitslu, sigur núverandi formaðurin í EB, Olaf Fríðheim.

Men føðingardagsveitslan verður tó ikki hildin sjálvan føðingardagin, uttan verður flutt ein mánað til tann 22. mars. og tað hevur sína orsøk. Hølisviðurskiftini.

Ætlandi skuldi nýggja ítróttarhøllin standa liðug nú um vikuskiftið. Freistin var í grundini í gjár, sigur Olaf Fríðheim. Men sum so ofta er, er okkurt, sum ikki rakk fram til tíðina. So avgjørt er at flyta hátíðarhaldið ein mánað.

Sjálvandi stendur EB húsið í bygdini, men tað er stutt og greitt tov lítið til tað tiltak, ætlað er, sigur formaðurin. Karmurin um borðhald og tað, har til hoyrir, verður ítróttarhøllin, meðan so verður farið oman í EB húsið at dansa aftaná, sigur formaðurin.

Innbjóðingar eru sendar øðrum ítróttarfeløgum og stuðlum hjá EB, eins og roknað verður við, at til eina slíka veitslu fer nógv fólk at vilja vera við.

Olaf Fríðheim sigur um virksemið hjá EB, at mest er tað fótbóltur í løtuni, og hann varð fyri nøkrum árum síðan lagdur saman við Streymi í kenda felagslíðið EB-Streym.

– Men á seinasta aðalfundi hjá Eiðis Bóltfelag varð hondbóltsnevndin endurstovnað. Farið verður av álvara undir at spæla hondbólt aftur, nú ítróttarhøllin við øllum sínum møguleikum srtendur liðug, sigur formaðurin í Eiðis Bóltfelag.

Nýggja hondbóltsnevndin hjá Eiðis Bóltfelag verður kvinnustýrd. Nevndarlimirnir eru Sigga Vesturtún, Elin Vesturdal og Jastrid Andreasen. Tað verður, sum vera man, eingin kappingarhondbóltur í vár, nú kappingin er so langt komin, men í heyst verður av álvara farið undir aftur hondbólt í gomlu hondbóltsbygdini Eiði.

– Grundin til, at hondbólturin heilt helt uppat á Eiði var tann, at venjingarumstøðurnar vóru so vánaligar, og trupult var at koma til venjing, sum gekk fyri seg í høllini á Skála.

Hinvegin eru møguleikar at skipa fyri øðrum smærri tiltøkum soleiðis beinanveg, høllin letur upp. Sum eitt nú innandura fótbóltskappingum og borðtennis, sum eisini var frammalaga á Eiði ta tíð, tað var, men sum nú trívist sera væl í Sundalagnum.

Eru tað kvinnurnar, sums týra hondbóltinum á Eiði, er tað hinvegin ein mansstýrd høvuðsnevnd í EB. Ikki tí, sigur Olaf Fríðheim. Nevndin, sum sat undan okkum, var ein kvinnunevnd, men tær hava nú lagt frá sær eftir at hava sitið fleiri skeið.

Teir, sum í dag manna nevndina í Eiðis Bóltfelag saman við Olafi Fríðheim formanni, eru Magnus Magnussen, næstformaður, Hans Jákup Johansen, kassameistari og Kaj Joensen, skrivar.

Nú Eiðis Bóltfelag fyllir 90 ár, er besta føðingardagsgávan uttan samanbering ítróttarhøllin, sum verður tikin í brúk fyrsta dagin

Lívligt á Giljanesi

Tað hevur veirð rættiliga fitt av fólki, sum hevur gist á vallaraheiminum á Giljanesi seinasta árið. Nú bíða tey spent eftir, hvørja ávirkan undirsjóvartunnilin fer at hava

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Sandavági:
Á vallaraheiminum á Giljanesi hevur so at siga onga nátt veir tómt hetta seinasta árið, sigur Niels Olgar Joensen, sum rekur vallaraheimið.

Men so leggur hann afturat, at hetta er fyrsta árið, síðan tey fyri 12 árum síðan byrjaðu, at tað hevur malið runt.

Tað eru serliga danskir skúlaflokkar, sum brúka vallaraheimið á Giljanesi í summarhálvuni, sigur Niels Olgar Joensen. Um veturin hava tað so verið føroyingar, sum hava búð her. Serliga arbeiðsfólk, sum komið er vestur í Vágar aðrastaðni úr landinum. Men eisini ítróttarfólk og onkur annar bólkur, hava brúkt vallaraheimið. Nú um vikuskiftið er tað til dømis eitt ungdómsorkestur, sum er í Vágum á venjingarlegu, sum býr her, sigur hann.

Hann er spentur upp á at siggja, hvussu og um hetta fer at broytast, nú undirsjóvartunnilin er latin up, og fólk sleppa heimaftur, tá tey vilja.

Hinvegin er likt til, at donsku skúlaflokkarnir, sum eru nógv størsti kundabólkurin hjá vallaraheiminum, hava funnið út av, at tunnilin eisini kann brúkast til túrar hinvegin.

Vanligi pakkin hjá vallaraheiminum hevur verið, at gestirnir eru komnir við flogfari. Hava so búð tvær nætur á Giljanesi, tvær á Gjáargarði og síðan tvær á Bládýpinum í Havn.

Men skúlarnir hava funnið út av, at tá ferðast verður í Føroyum, er nokk við einum dagstúri til Havnar, sigur Niels Olgar Joensen, so okkurt bendir á, at tey fara at verða verandi í Vágum og so koyra runt hiðani.

Tað hevur víst seg, at somu skúlarnir, sum einaferð hava sent ein flokk til Føroya, senda flokkar aftur ár um ár. Og tað er enntá somu lærarar, sum koma aftur, sigur Niels Olgar Joensen.

Hann væntar, at tað nú kann fara at merkjast eisini hinvegin, at tunnilin er komin. Tá nú nýggja Norrøna fer at sigla við nógvum ferðafólki, kann væntast, at tey í nógv størri mun fara at koma vestur í Vágar, nú samferðslumynstrið er heilt broytt.

Niels Olgar Joensen sigur, at tey hava biðið Sandavágs Kommunu um loyvi at slætta eitt øki uttan fyri vallaraheimið til tjaldingarpláss. Hann væntar at frætta aftur frá kommununi heilt skjótt.

Annars verða umvælingar gjørdar á sjálvum vallaraheiminum. Tó í smáum, sigur hann, tí tað er ikki betri forrætning enn so, at tað má ansast væl eftir útreiðslunum.

Fyri einum tveimum árum síðan varð bygningurin klæddur uttan, allur sum var, og nú eru baðirúmini og wc gjød heilt av nýggjum. Tað er ræettiliga nossligt innan.

Kømurini mugu tó bíða eitt sindur enn, sigur Niels Olgar Joensen, men ásannar, at tey treingja eisini til eina hjálpandi hond.

Tað hevur verið heilt fitt av gestum á vallaraheiminum á Giljanesi hetta seinast árið, sigur Niels Olgar Joensen, sum vænar, at undirsjóvartunilin fer at draga nøkur av ferðafókunum frá nýggju Norrønu vestur í Vágar

Mynd: Edvard Joensen